# *Fundarfrásøgn*

**Á fundi:** Mildrid á Lógv, Lisbeth Næs, Jónleif Johannesen, Magnus Arge og Ella Heinesen, foreldraumboð, Sven Dahl og Óluva Klettskarð, kommunuumboð, Tóra við Keldu og Eyðbjørn Jacobsen, læraraumboð og Vagn Foldbo, skrivari.

**Ikki á fundi:** Karl Birgir Isaksen, Anna Maria Joensen og Markus í Norðnástovu.

1. **Fundarfrásøgn frá seinasta fundi**
   Fundarfrásøgnin frá fundi tann 11. januar varð lisin upp og góðkend.

2. **Kunning frá skúlastjóranum**
   Starvsfólk skúlans høvdu ein samansjóðingardag 15. januar. Her var m.a. arbeitt við, hvat í gomlu mentanunum vit ynskja at taka við okkum í samanlagda skúlan. Eisini arbeiddu vit nakað við framtíðar ynskjum og dreymum fyri skúlan. Dagurin endaði við einum veitsludøgurða. Samanumtikið ein sera væl eydnaður dagur.
   Leiðslan hevur havt tveir sera gevandi arbeiðsdagar í Skálavík. Arbeitt varð serliga við at lofta nøkrum av tí, sum kom fram á samansjóðingardegnum, og hvussu vit skipa komandi skúlaár.
   Í samband við at Elmar Jacobsen og Paulina Andreasen fara frá, verður skipað fyri fráfaringarløtu fríggjadagin 19. februar kl. 13:00. Í hesum sambandi eru skúlastýrislimir vælkomnir.
   Komandi skúlaár hava Stig Elttør, Bjarni Ziska Dahl og Kjartan Sleire søkt um farloyvi.
   58 næmingar eru skrivaðir inn til 1. flokk komandi skúlaár.

3. **Meginreglur fyri royking**
   Meginreglur fyri royking vórðu lagdar fyri skúlastýrið til samtyktar. Reglurnar hava verið í samstarvsráðnum og námsfrøðiliga ráðnum til hoyringar.
   Skúlastýrið samtykti meginreglurnar.

4. **Meginreglur fyri umsjón av næmingum**
   Meginreglur fyri umsjón av næmingum á Skúlatrøð vórðu lagdar fyri skúlastýrið til samtyktar. Reglurnar hava verið í samstarvsráðnum og námsfrøðiliga ráðnum til hoyringar.
   Skúlastýrið samtykti meginreglurnar.

**5. Ymiskt**

Stjórin hevur spurt seg fyri hjá Sernám um orðingarnar, sum foreldrini fáa í samband við lesikanningarnar. Sernám hevur svarað, at vit kunnu gera broytingar í orðingunum, um vit ynskja hetta. Skúlastjórin hevur biðið førleikastovuna eftirhugt orðingarnar.

Fundur lokin kl. 18:30

| | |
|---|---|
| Mildrid á Lógv, forkv. | Ella Heinesen |
| Magnus Arge | Lisbeth Næs |
| Jónleif Johannesen | Óluva Klettskarð |
| Sven Dahl | Tóra við Keldu |
| Eyðbjørn Jacobsen | Vagn Foldbo, skrivari |